# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

5. august fingu Rannvá Due Zachariassen og John Dam Ålborg, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4250 gr.

6. august fingu Diana Bruce og Kristoffer Petersen, Næstved, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3400 gr.

7. august fingu Nathalia og Anfinn Isaksen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3500 gr.

7. august fingu Malan Holm og Mads Kristoffur Hentze, Skopun, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3300 gr.

7. august fingu Siri Larsen og Olgar Mortensen, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3850 gr.

7. august fingu Hildur Túná Fjørdal og Rúni Túná Tummasarson, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3950 gr.

7. august fingu Helfrid Poulsen og Helgi Stefán Ingibjørnsson, Eiði, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 4150 gr.

8. august fingu Heidi og Kim Krett Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4300 gr.

8. august fingu Kitty Dam og Heri Christophersen, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3150 gr.

9. august fingu Anna Kristin Bæk og Dánial Hoydal, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3050 gr.

9. august fingu Majken og Jónsvein Joensen, Hvítanes, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3950 gr.

9. august fingu Vibeke og Eyðstein Jakobsen, Vodskov, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3990 gr.

10. august fingu Joan Müller og Magni Petersen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3680 gr.

11. august fingu Hjørdis J. og Holgar Johannesen, Leirvík, ein son. Hann var 57 cm. og vigaði 4150 gr.

11. august fingu Annika Nolsøe, Dalur og Áki Olsen, Vestmanna, tvíburar – døtur. Tann eina var 54 cm. og vigaði 2680 og hin var 54 cm. og vigaði 3140 gr.

11. august fingu Elin og Hans Tausen, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 2775 gr.

12. august fingu Signhild Jacobsen og Sámal Jákup Olsen, Skálavík, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4950 gr.

12. august fingu Vanja Wraae og Anfinnur Nyholm Debess, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4000 gr.

12. august fingu Óluva Maria og Jóhann Simonsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4250 gr.

13. august fingu Anna Jóna Olsen og Leif Ellingsgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4625 gr.

13. august fingu Ida og Regin Jacobsen, Nes, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4200 gr.

13. august fingu Rúna og Eddie Magnussen, Vágur, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3350 gr.

## Andlát

**9. august**
Sofus Andreas Hansen, Saltangará, 71 ár
Juel Edmund Høgnesen, Leirvík, 84 ár
**11. august**
Gunnar Stokkholm, keypmaður, 92 ár
**12. august**
Sannemi Hansen, Runavík, 74 ár
Borgar í Andrastovu Nybo, 61 ár
Rúnur Tavsen, Runavík, 51 ár
**13. august**
Alexandra Kjærbo, fødd Johannesen, Klaksvík, 50 ár

## Obert Eliasen deyður



Fríggjadagin 8. august 2003 andaðist Obert Eliasen í Fuglafirði, 80 ára gamal. Hann var sonur Hans Elias Eliasen, í Beitinum, og Pauline f. Poulsen, dóttir Mørkabóndan, bæði úr Fuglafirði. Obert, sum var elstur av systkinunum, var føddur í Fuglafirði 12. november 1922, og átti hann systrarnar Ednu (1924) og Bodhild (1926). Mamman doyði av meslingum í januar í 1929. Obert var tá gott 6 ára gamal.

Pápin, Hans Elias, giftist uppaftur við Súsonnu Olsen úr Leirvík, og fingu tey synirnar Poul (1932) og Martin (1936).

Obert giftist 13. februar 1947 við Judith, f. Petersen, fødd 26. februar 1924, dóttir Sámal Petur Petersen og Julie, f. Hansen í Fuglafirði. Obert og Judith fingu børnini: Eli (1948), Julian (1950), Kirstin (1956) og Jónu (1964), umframt at tey eiga 7 ommu- og abbabørn og 4 langommu- og langabbabørn. Obert og Judith fluttu í 1949 í nýbygdu hús teirra í Fløtugerði.

Obert fór blaðungur at arbeiða hjá S.P. Petersen, fyrst sum ørindadrongur og síðani á skrivstovuni, handlinum, skipaavgreiðsluni v.m., og starvaðist har til virkið gavst mitt í sekstiárunum.

Obert fekk sær kvøldarbeiði framíhjá og byrjaði at selja vørur, sum eingin annar har á leið tá seldi, m.a. radiotól, súklur o.s.fr. Í 1956 keypti hann húsini, sum motordrivna elverkið hevði verið í, og stovnaði Ullvirkið. Maskinurnar vórðu keyptar brúktar úr Danmark. Obert gavst við Ullvirkinum í 1967 og seldi hesi húsini. Í dag eru hesi hús felagslonin hjá pensiónistafelagnum.

Obert arbeiddi eitt skifti sum kommunuskrivari í Fuglafirði, men síðan hevur hann bert havt sín egna handil.

Obert var sera íðin á mentunar- og lokalpolitiska økinum. Saman við øðrum skipaði hann fyrst í fýratiárunum fyri kvøldskúla í bókhaldi og seinni m.a. fyri meiri skipaðum handilsskúla, fyri stovnsetan av bókasavni, var ein av stovnarunum av ÍF, og var ein av rithøvundunum til »Brot úr Fuglafjarðar Søgu«.

Obert hevði sera stóran áhuga í søgu, siðsøgu og ættarsøgu, og brúkti manga fríløtuna til ættargransking, yrking og málningar. Hann var fuglfirðingur við stóra F, men hevði eisini eitt sera vakið eyga út eftir og heilt út í heim.

Hann savnaði staðanøvn í Fuglafjarðar kommunu og var í nevndini, sum gav gøtunum í Fuglafirði nøvn. Tá hann sum 77 ára gamal keypti sær nýggja teldu, fekk hann sær internetsamband, hetta hevði hann stóra gleði av.

Obert krógvaði ikki, at hann var sambandsmaður og var okkurt skeiði nevndarlimur í Samhald, valfelag Sambandsfloksins í Eysturoy, og plagdi at vera stillari til Løgtings- og Fólkatingsvalini. Hann var eisini í fleiri ár bygdaráðslimur í Fuglafirði.

Av álitisstørvum hansara kunnu m.a. verða nevnd, nevndarlimur í SEV vegna Fuglafjarðar kommunu í mong ár og løgtingsvaldur stýrislimur fyri Klaksvíkar Sjúkrahús frá 1955 í útvið 40 ár, undantikið eina stutta tingsetu.

Obert yrkti fleiri sálmar og sangir. Ein av prentaðu sálmunum við jarðarferðina 12. august, Kirkjuklokkan, var ein av hansara. Eisini sang tenorurin, Hannis Hansen, í Fuglafirði, hendan sangin hjá Oberti við urguspæli í kirkjuni:

*Meg minnist mangan morgun,*
*eg undir fossi sat.*
*Langt burt frá øllum sorgum,*
*eg hugin fara lat.*

*Tað einasta eg hoyrdi,*
*var fossins javna sjóð.*
*Einki var sum tordi,*
*órógva hetta ljóð.*

*Um dagar kennast veikir,*
*far tær til fossin inn.*
*Ein slíkur morgun kveikir,*
*tær magn í sál og sinn.*

*Har kanst tú sita stillur,*
*ei hoyra verðins larm.*
*Um fossur rennur villur,*
*tær unnast við hans barm.*

## Guðrun á Borg 50 ár



Mánadagin 18. august fyllir Guðrun á Borg í Havn 50 ár. Guðrun er fødd og uppvaksin í Havn, dóttir Jolinu, f. Nielsen, ættað úr Heiðunum, og Hallgrím Rein, vanliga nevndur Hagge, úr Havn.

Guðrun er útbúgvin skrivstovukvinna, hon lærdi á Fútaskrivstovuni. Eftir at hon varð útlærd, arbeiddi hon eitt stutt skifti á Føroya Gjaldsstovu. Síðan hevur hon arbeitt á Fútaskrivstovuni.

Hon er ein av trúgvu B36 stuðlunum, og saman við manninum hevur hon eisini verið virkin innan áhugafelagið Føroya Ellisakfør.

Guðrun er gift við Heina á Borg úr Havn, farmaflutningsleiðara hjá Strandfaraskipum Landsins. Børnini eru: Høgni, f. í 1970, doyði 2. desember 2002, Marian f. 1975, Jákup, f. 1979, og Annika, f. 1988.

Guðrun verður burturstødd føðingardagin.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jens Jacobsen gevst sum portørur




Fríggjadagin 15. august 2003 hevði Jens Jacobsen í Klaksvík, sum fylti 67 ár tann 10. august, sín seinasta arbeiðsdag sum yvirportørur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Jens er sonur Ingeborg, f. Danielsen, ættað úr Havn, og Petur Jul Jacobsen úr Saltnesi. Hann er føddur 10. august 1936 á Sydradali á Kallsoynni og er uppvaksin har. Hann er næstelstur av átta systkjum.

Sum ungur fór hann til skips. Tann 26. apríl 1959 byrjaði hann sum arbeiðsmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, í sambandi við at sjúkrahúsið skuldi umbyggjast. Seinni sama ár byrjaði hann sum portørur. 1. oktober 1982 fekk hann starvið sum yvirportørur og fríggjadagin 15. august hevði Jens sín seinasta arbeidsdag eftir at hava starvast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í 44 ár.

Tvey tíðarskeið hevur hann tó verið burturfrá hesum arbeiði. Í 1978 arbeiddi hann í hálvt ár sum portørur á sjúkrahúsinum í Herlev og seinni aftur, í 1995-1996, arbeiddi hann aftur á sjúkrahúsinum í Herlev sum portørur.

Jens eigur fýra børn. Edward, 38 ár, Winnie 32 ár, Súsanna 24 ár og Olevina 21 ár. Hann er giftur við Marjun Vitalis Jacobsen, sjúkrasystir úr Klaksvík.

## Esther og Sámal Mikkelsen gullbrúdleyp



Esther og Sámal Mikkelsen í Klaksvík hava gullbrúdleyp 18. august. Dagurin verður hildin sunnudagin 17. august í heiminum Undir Hálsi 25.

Sámal er sonur Onnu Margretu Matras, uttan av Oyri og Mikkjal Petur Mikkelsen, úr Syðrugøtu. Sum ungur lærdi hann til skipstimbrara og tók eisini skiparaprógv á Klaksvíkar Sjómansskúla. Síðan fór hann til skips og var eitt nú nógv ár við Skálabergi. Seinnu nógvu árini arbeiddi hann sum byggimeistari í Klaksvík.

Esther er dóttur Jakubinu Ellingsgaard, ættað av Eiði og Jákup Andrias (Stoffa Jákup) Hansen, Sørvágur. Sum yngri húsmóður knýtti Esther trol fyri netastovuna hjá Kjølbro, og tað vóru ikki so fáir bellar Kjølbrotrolararnir fingu umborð, sum hon hevði knýtt. Seinni fór hon norð á Kósavirki at arbeiða og var har í nógv ár tilsamans.

Esther og Sámal fingu tríggjar synir: Mikkjal, Jákup og Jóannes.

Nú tey kunnu hátíðarhalda gullbrúdleypsdagin, vilja vit ynskja teimum hjartaliga tillukku.

## Gunnvá Reynheim Olsen deyð



Hósdagin 7. august andaðist Gunnvá Reynheim Olsen í Hoyvík 37 ára gomul. Gunnvá var fødd og uppvaksin í Havn. Hon var yngst av børnunum hjá Turid, f. Larsen, ættað av Oyrarbakka, og Mourits Reynheim úr Havn.

Umframt at passa hús og heim var Gunnvá ein av okkara royndu bussførarum. Fyrst í 90-unum fór hon at koyra býbuss í Havn. Frá 1996-98 koyrdi hon býbuss í Keypmannahavn. Frá 1998 til 1. februar 2003 koyrdi hon aftur býbuss í Havn. Hon koyrdi eisini sum bussførari hjá Bygdaleiðum. Hon var kend sum ein fyrikomandi og avhildin bussførari.

Gunnvá hevði koyrikort til buss, lastbil og trailara. Ætlanin var, at hon skuldi avloysa sum bilførari hjá Postverkinum nú í summar, men hetta bleiv av ongum, tá hon gjørdist álvarsliga sjúk. Børn hennara eru: Marita, Jóhanna, Johannes og Elisabeth.

Fyri kortum giftist Gunnvá uppaftur við Gunnari Olsen úr Syðrugøtu. Tey bygdu sær hús í Hoyvík.

## Dagurin

**16. august. Rokus,** deyður í umleið 1330. Varð føddur í Montpellier og gjørdist kendur sum tann, ið grøddi fólk, ið vóru rakt av sótt. Tá ið hann kemur til hús eftir eina pílagrímsferð til Róm, verður hann lagdur undir at njósnast, verður tikin og kastaður í fangahús, har hann doyr.

Rokus er ein tiltikin grindadagur í Føroyum, og tað hóskar væl við, at augustmánaður var mesta grindatíðin í Føroyum. Mangar eru søgurnar um grindaboð í hoyna, og onkur av teimum gomlu helt skemtiliga fyri, at grindirnar komu undir land drignar av tí frískliga hoyanganum.

**17. august. Anastasius.** Annaðhvørt tann Anastasius, sum var biskupur í Terni í Italiu í 6. øld ella ein Anastasius, ið doyði sum pínsluváttur í Persiu í umleið 620.

**18. august. Agapetus,** deyður í umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.